## Bókin hjá Andy Mitten útgivin

Í dag er útgávudagur fyri bókina hjá kenda bretska fótbóltsrithøvundanum, Andy Mitten, sum er kendur fyri sínar greinar í fótbóltsblaðnum, "FourFourTwo". Bókin nevnist "Mad For It - From Blackpool to Barcelona, football´s greatest rivalries". 26 grannauppgerðir úr øllum heiminum verða umrøddar í bókini. Andy Mitten nevnir grannauppgerðina, hann sá millum B36 og HB á ovara vølli í Gundadali, á hásumri í 2006 fyri tað "einastu vinarligu grannauppgerðina í øllum Heiminum". Allir fótbóltsáhugaðir og forvitnir føroyingar kunnu bíleggja bókina frá www.amazon.co.uk. Bókin er longu næstmest bílagda fótbóltsbókin hjá Amazon.




## B36 orsøk til Brøndby-tap

Heilt óvæntað tapti Brøndby 3-0 á heimavølli móti Randers í gjár. Orsøkin var strævna Føroya-ferðin, sigur venjarin Tom Køhlert. – Tað var heilt sjónligt, at leikararnir vóru troyttir eftir ferðina í Føroyum, og fleiri av lyklaleikarunum, sum vanligt arbeiða hart allan dystin á tamb, hava ikki tað síðsta í dag, sigur Tom Køhlert millum annað við heimasíðuna hjá Brøndby eftir ósigurin. Úrslitini í SAS-liguni hetta umfarið vóru annars hesi: FC Midtjylland - AC Horsens 2-1, Esbjerg fB - FC Nordsjælland 1-1, OB - AGF 3-1 og Brøndby IF - Randers 0-3.

# Róðrarfólk heiðraðu hvørjum øðrum

**Á gallaveitslu fríggjakvøldið heiðraði róðrarfólki hvørjum øðrum, eftir lokið kappingarár. Ársins áralag, yvirraskilsi, fair play og felag vóru kosin á veitslu í HB-húsinum**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

250 fólk vóru savnað í HB-húsinum fríggjakvøldið. Alt samalt rógvarar, sum í summar hava kapprógvið yvir sjey stevnur. Á ólavsøku var seinasta takið tikið, vinnararnir í hvørjum einstøkum róðri funnir og heiðraðir av fjøldini, ið hevði leitað sær til høvuðsstaðin at fylgja tjóðarítrótt okkara.

Fríggjakvøldið heiðraði róðrarfólki hvørjum øðrum, tá tey vóru savnað í veitslulag í HB-húsinum, har stór gallaveitsla var. Matur, drekka og góður tónleikur stóð á breddanum, umframt at útvaldir bátar og manningar skuldu heiðrast enn einaferð.



*Riddarin gjørdi eitt hál fýra teir síðstu róðrarnar, men tað rakk ikki til FM-heitið. Fríggjakvøldið fingu teir plástur upp á sárið, tá teir vórðu kosnir at hava ársins áralag*

*Mynd: Kristoffur Lützen*


*Á Havnarbátinum var lagi sum vera man gott, og tað var tað sum heild í Havnar Róðrarfelag. Havnarbáturin varð heiðraður fyri sítt vakra áralag, og Havnar Róðrarfelag varð kosið ársins felag*

*Mynd: Kristoffur Lützen*

### Ársins áralag

Á árligu gallaveitslunum er afturvendandi táttur, at velja ársins áralag í hvørjum bólki. Hjá 5-manna førum hjá gentum vann Junkarin henda heiður. Erla Kongsdóttir vann heiðurin í 5-manna førum hjá kvinnum. Hjá 6-manna førum hjá kvinnum og monnum vóru tað ávíkavist Fortuna og Riddarin, ið vunnu henda róður.

Árnfirðingur hevði ársins áralag hjá 8-manna førum við monnum, og Havnarbáturin hjá 10 manna førum við monnum.

### Riddarin yvirraskaði

Ein annar heiður var ársins yvirraskilsi. Tann bátur, ið hevði tikið flest fólk á bóli og gjørt nakað heilt óvæntað. Semja var um, at hesin heiður skuldi falla Riddaranum í lut. Báturin úr Miðvági vann fýra teir síðstu róðrarnar, eftir at hava ligið nummar trý, fýra og trý á teimum fyrstu róðrunum.

Ein annar bátur, sum í mun til Riddaran kom rættiliga væl frá byrjan í ár, var Ormurin Langi. Hann vann tríggjar av fýra teimum fyrstu róðrunum. Tað var tó ikki nóg mikið til at tryggja sær FM-heitið, tí hetta fór Havnarbáturin avstað við í síðsta enda. Fríggjakvøldið fekk báturin hjá Knørrafelagnum eitt plástur upp á sárið, tá hesir vunnu Fair-Play prísin.



*Elsa Maria Olsen, ið saman við Lív Højsted Horsdal var vertur til Róðrargallaið, handar her Annu Michel Nielsen steyp fyri ársins áralag*

*Mynd: Kristoffur Lützen*

### Havnar Róðrarfelag ársins felag

Síðsta heiðurin á kvøldinum fall til eitt felag. Ársins felag skuldi kjósast, og her var lítil ivi. Havnar Róðrarfelag vann fýra FM-róðrar, og á ólavsøku vunnu bátar felagsins heili sjey róðrar. Drekin við gentum, Sílið við kvinnum, Sílið við dreingjum og Havnarbáturin, umframt at Sílið eisini vann barnaróðurin við gentum, og at Havnarbáturin og Ørvur vunnu tveir oldboysróðrar.



*Tað var ikki bara steypurin, ið var havdur á lofti*

*Mynd: Kristoffur Lützen*


*Manningin á Erlu Kongsdóttir letur seg fagna av teimum hálvtriðhundrað fólkum í HB-húsinum fríggjakvøldið*

*Mynd: Kristoffur Lützen*